VB – HB, 1. hálvfinala:

# Kravið hjá VB er ein sigur



*Jógvan Martin Olsen, venjari hjá NSÍ, heldur, at B68 er favorittur til dystin móti NSÍ. Hann møtir nú aftur B68, har hann sjálvur hevur spælt í trettan ár*

**VB hevur góðar vónir undan fyrru hálvfinaluni móti HB í Vági í dag. Meðan kravið hjá vágbingum er ein sigur, fara havnarmenn eftir einum javnleiki. Bæði liðini eru fullmannað**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Kappingin um Løgmanssteypið er farin at halla, og í dag, grundlógardagin, bresta VB og HB saman í fyrru hálvfinaluni.

Hetta er aðru ferð innan fýra dagar, at júst hesi bæði liðini møtast. Landskappingardysturin sunnudagin endaði við javnleiki 0-0, men bæði liðini høvdu nógvar góðar málmøguleikar, og dysturin var sera góður.

Nú er tað so steypakappingin. HB má metast sum favorittur at koma víðari til finaluna, sum verður á ólavsøku móti NSÍ ella B68, sum spæla í hinari hálvfinaluni. Orsøkin til at havnarliðið verður útnevndur sum favorittur undan dystinum er, at HB hevur spælt framúr væl higartil í landskappingini, og enn er liðið ósigrað. Dysturin í dag er sera opin, men roknast kann við, at VB fær tað sera torført í Havn.

### Kravið er sigur

Um VB skal gera sær nakrar vónir um at koma í finaluna, so er kravið í dag ein sigur.

– Eingi ivi er um, at kravið hjá okkum er ein sigur, men vit hava góðar vónir til dystin í dag, sigur Eyðun Jacobsen, liðformaður hjá VB.

Hann sigur um dystin í landskappingini sunnudagin, at tað avrikið vóru teir sjálvir væl nøgdir við. Í seinna hálvleiki hevði VB eitt áhaldandi trýst á HB-málið og kundi eins væl fingið eitt mál. Tí trúgva vágbingar uppá, at tað ber til at koppa HB í hálvfinaluni.

VB liðið er fullmannað til hálvfinaluna. Eingin hevur leikbann, og eingin hevur skaða at dragast við. Tí er lagt upp til ein spennandi dyst millum VB og HB í dag.

### Nóg mikið við javnleiki

Liðformaðurin hjá HB heldur, at hansara menn kunnu vera nøgdir við javnleik móti VB í Vági.

– Vit fara eftir javnleikinum, og tað eru vit væl nøgdir við, sigur Rúni Nolsøe, liðformaður.

Hann leggur dent á, at tað altíð er torført at spæla í Vági. Vøllurin er út av lagi vánaligur, og leikararnir hava mangan ilt við at fóta sær á hála undirlagnum. Um HB fær ein javnleik í hús, so rokna teir við at avgera hálvfinaluna á heimavølli.

HB hevur heldur ikki nakað leikbann ella nakran skaða at hugsa um. Jóhannis Joensen fekk gult kort móti VB sunnudagin, og tað hevur við sær, at hann fær leikbann sunnudagin móti B68 í landskappingini, men hann er tøkur í steypakappingini.

# B68 skal reisa seg

**B68 tekur í dag, mikudagin, ímóti NSÍ í einum framskundaðum landskappingardysti. B68 hevur sera tætta skrá fram til summarfrítíðina og skal reisa seg eftir 4-0 tapið móti B36**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Ein sera avgerandi dystur í landskappingini verður á Toftum millum B68 og NSÍ grundalógardagin. Bæði liðini hava undan dystinum tíggju stig eftir fimm dystir. Hetta ger grannauppgerðina enn meira spennandi, og væntandi verður dysturin tættur og harður, sum dystirnir millum arvafíggindarnar vanliga eru.

B68 tapti sín fyrsta dyst í landskappingini sunnudagin, tá B36 vann 4-0 í Havn, eftir at B68 ikki hevði tapti ein í tveir mánaðir.

### Skert álop

B68 má klára seg uttan tveir av sínum føstu framherjum. Anders Nygaard situr framvegis uttanfyri við skaða í fótinum, sum hann fekk móti KÍ. Danski framherjin var heldur ikki við móti B36.

Arnold Joensen fekk reytt kort ímóti B36, og hann er tí leikbannaður í hesum dystinum. Annars eru allir hinir leikararnir tilreiðar.

At tveir av føstu framherjarunum ikki eru tøkir, gevur venjaranum hjá B68 Frank Skytte mikið høvuðbrýggj. Hann skal nú finna nýggjar leikarar í álopið.

Móti B36 spældi Fróði Benjaminsen sum fremsti maður, men hetta eydnaðist ikki væl. Í seinna hálvleiki komu Marcello Marcelino og Øssur Jacobsen inn í álopið, og hesir báðir eru tveir møguleikar, sum venjarin hevur í álopinum.

– Tað hevur alstóran týdning, at vit reisa okkum eftir tapið móti B36. Tað er nú, at lombini verða sáldað frá bukkunum í kappingini, og vit skulu prógva, at vit kunnu standa okkum í oddinum, sigur Frank Skytte.

Hann vísir á, at B68 hevur eina sera tætta skrá fram til summarfrítíðina. Í 36 dagar skal liðið spæla níggju dystir.

### Jógvan Martin á heimabeiti

NSÍ fer við einum fullmannaðum liði inn á Toftir. Helgi L. Petersen hevur verið darvaður av einum smávegis skaða í rygginum, men hann spælir nú aftur við fullari ferð.

Jógvan Martin Olsen, venjari hjá NSÍ, sigur, at hansara lið sjálvandi fer fram á vøllin og fer eftir sigrinum.

Jógvan Martin Olsen er sjálvur toftamaður og hevur spælt við 1. deild hjá B68 í trettan ár. Hann møtir nú sínum gamla liði fyri fyrstu ferð sum venjari hjá grannunum NSÍ.

– Sjálvandi er tað nakað serligt fyri meg at møta B68 aftur, tí eg eri uppvaksin á Toftum og havi spælt við B68, men nú eri eg venjari hjá NSÍ, sigur hann.

Hann heldur, at B68 er favorittur undan dystinum, tí teir spæla á heimavølli, og hann væntar, at B68-leikararnir eru serliga uppsettir, tí teir taptu so stórt í Havn.



*Robert Cieslewicz og hinir VB-leikararnir vóru teir fyrstu, ið megnaðu at taka stig frá HB í landskappingini. Í dag bresta somu lið saman í fyrru hálvfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið*



# Ruddingardagar í Tórshavnar kommunu




Fríggjadagin 7. og leygardagin 8. juni 2002 verða ruddingardagar í Tórshavnar kommunu.

Feløg, skótar, ítróttarfeløg o.fl. fara at stuðla hesum tiltaki við at rudda hvørt sítt øki. Kommunan heitir eisini á onnur, um at rudda frí- og felagsøkir.
**Heitt verður á fólk, um sjálvi at beina privat burturkast á brennistøðina ella bingjupláss.**

Sekkir (skiljing av ruski):
Grønir sekkir: rusk ið kann brennast (pappír, óviðgjørdur viður, posar o.a.)
Klárir sekkir: rusk ið ikki brennur (glas, metal, dekk, gamalt hegn o.a.)

Dálkandi burturkast, so sum akkumulatorar, máling, imp. viður o.a. skal leggjast og avhendast fyri seg á Brennistøðini á Hjalla ella á bingjuplássunum.

**Rusksekkir fáast ókeypis á hesum støðum:**

**á brennistøðini á Hjalla**
*fríggjadagin og leygardagin kl 8.00 -kl 20.00*

**á Skálatrøð**
*fríggjadagin og leygardagin kl 8.00 -kl 20.00*

**við róðrarneystið á Argjum**
*leygardagin kl 8.00 - kl.20.00.*

**í Norðradali**
*leygardagin kl 8.00 og kl. 13.00*

**í Syðradali**
*leygardagin kl 8.00 og kl. 13.00*

**í Kaldbak**
*leygardagin kl 8.00 og kl. 13.00*

**í Kollafirði**
*Leygardagin kl 8.00 - kl.18.00*

| | |
|---|---|
| 1 | Veiðufelagið Byrsumúli |
| 2 | B 36 |
| 3 | Hvítanesnevndin |
| 4 | H 71 |
| 5 | HB |
| 6 | Bogaskjótifelagið Tambar |
| 7 | Tórshavnar kommuna |
| 8 | Fimleikafelagið Ljósið |
| 9 | Flogbóltsfelagið Fleyr |
| 10 | Tórshavnar Súkklufelag |
| 11 | Handlar í miðbýnum |
| 12 | Felagið Tórshavn |
| 13 | Havnar Róðrarfelag |
| 14 | Føroya Sílaveiðufelag |
| 15 | Eigarafelagið Norðasta Horn |
| 16 | Havnar Fimleikafelag |
| 17 | Føroya Ríðingarfelag |
| 18 | Hondbóltsfelagið Neistin |
| 19 | KFUK |
| 20 | KFUM |
| 21 | Skótalið S. Brestissonar og T. Sigmundsdóttir |
| 22 | Skótalið Frelsunarhersins |
| 23 | Havnar Svimjifelag |
| 24 | Hondbóltsfelagið Kyndil |
| 25 | Eigarafelagið undir Brúnni |
| 26 | Tórshavnar Golfklubbi |
| 27 | Eigarafelagið millum Gilja |
| 28 | Eigarafelagið á Tórgarði |
| 29 | Eigarafelagið í Tórsbyrgi |
| 30 | Eigarafelagið Miðstaðarøkið á Hálsi |
| 31 | Eigarafelagið Berjabrekka 1 |
| | Eigarafelagið Berjabrekka 2 |
| 32 | Eigarafelagið Niðari Ternuryggur |
| 33 | Eigarafelagið Ovari Ternuryggur |
| 34 | Eigarafelagið Vesturi á Flat |
| 35 | Eigarafelagið oman Flat |
| 36 | Eigarafelagið oman Hoydalar |
| 37 | Eigarafelagið á Fløtum |
| 38 | Eigarafelagið undir Fjalli |
| | Eigarafelagið undir Fjalli 2 |
| 39 | Eigarafelagið Lítlagil |
| 40 | Eigarafelagið Inni á Gøtu |
| 41 | Eigarafelagið eystan Gil |
| 42 | Fótbóltsfelagið Fram |
| | Fram Flogbóltur |
| 43 | Róðrarfelagið Knørrur |
| | Tórshavnar Froskmannafelag |
| 44 | Tórshavnar kommuna |
| 45 | Argja Bóltfelag |
| 46 | Skótarnir á Argjum |
| 47 | Eigarafelagið Uppi á Hamri |
| 48 | Eigarafelagið nr. 3 |
| 49 | Eigarafeløgini nr. 1 og 2 í Havnadali |
| 50 | Argja Róðrarfelag |
| | Undirhúsið á Argjum |
| 51 | Tórshavnar kommuna |
| 52 | Havnar Badmintonfelag |
| | Heimafuglafelagið |
| 53 | Bragdið |
| | Havnar Judofelag |
| 54 | Eigarafelagið Snikkarastova |
| 55 | Tórshavnar kommuna |
| 56 | Dagstovnurin í Hoyvík |
| 57 | Tórshavnar kommuna |
| 58 | Norðradalur |
| 59 | Syðradalur |
| 60 | Kaldbaksnevndin |
| 61 | Kollafjørður |
| | Kollafjarðar Talvfelag |
| | Kollafjarðar ítróttafelag |
| | KFUM og KFUK skótarnir í Kollafirði |
| 62 | Eysturbúgvar |
| 63 | Láarvegur |
| 64 | Mýrisnípuvegur |
| 65 | Spógvavegur |
| 66 | Vípuvegur |
| T | Traðamenn |

## Tórshavnar kommuna

Ringjast kann til teknisku deild hjá Tórshavnar kommunu á tlf. 31 55 13 á Skálatrøð og 42 11 20 í Kollafirði í sambandi við ruddingardagarnar.